## Fransmenn aftur virknir í NATO

Alt bendir á, at Frakland er á veg aftur upp í NATO sum fullvirkandi limur. Tað hevur landið ikki verið í umleið 40 ár, síðani Charles de Gaulle tók tað burtur úr samgonguni, tí limaskapurin eftir hansara tykki hótti franska fullveldið. Nicolas Sarkozy, forseti, hevur ikki dult fyri, at hann vil hava Frakland sum fullvirkandi lim í NATO, og roknað verður við, at hann fer at boða frá teirri endaligu avgerðini í næstum. Men forsetin møtir mótstøðu. Fleiri politikarar eru ímóti fullum limaskapi í NATO, og meiningakanningar hava eisini víst, at nógvir fransmenn hava somu hugsan, sigur BBC.



## Ali og Aziz dømdir

Tariq Aziz (myndin) sum var varaforsætisráðharri og eitt skifti eisini uttanríkisráðharri í stýrinum hjá Saddam Hussein, varð í gjár dømdur 15 ára fongsul fyri dráp og brotsverk ímóti mannaættini. Somu revsing fekk fyrrverandi generalurin Hassan al-Majed, sum mer betur kendur sum Kemiski Ali. Teir báðir vórðu funnir sekir í sambandi við, at 42 handilsmenn blivu tiknir av døgum í Bagdad í 1992. Hetta var beint aftan á Flógvakríggið, og handilsmenninir blivu lagdir undir at hava sett prísin á týðandi vørum nógv upp, hóast tað vóru myndugleikarnir, sum skuldu áseta prísirnar.



*Bæði Helena Dam á Nestabø, landsstýriskvinna, og Annika Olsen, landsstýriskvinna, hava konkretar ætlanir á sínum økjum. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, er altíð glaður fyri at røra seg*

# Øll at røra seg

**Í andanum á rørsluárinum, sum varð skotið í gongd í gjár, so vóru øll í Norðurlandahúsinum sett at gera fimleik**

RØRSLUÁR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Stór sum smá vóru umleið klokkan 14 í gjár sett at gera fimleik. Tvær damur, ein ergoterapeutur og ein fysioterapeutur settu, hvønn tann einasta í Norðurlandahúsinum at gera fimleik.

Hóast trongt í salinum millum setrini, so vóru øll við, og øll flentu óført at hesum øðrvísi tiltaki til ein almennan fund.

Tað einasta, ið kanska kundi órógva, var, at sitiplássini hjá áskoðarunum, ið eru í eini ávísari hædd, fóru at danda nakað nógv, tá øll fólkini í takt stóðu og veipaðu og svingaðu í takt við tónleikin úr hátalarunum.

Fyri hetta hevði løgmaður sett rørsluárið, sum byrjaði í gjár. Eisini greiddu fleiri landsstýrisfólk frá sínum ætlanum í rørsluárinum.

Somuleiðis hevði Magni Mohr, ph.D. í human fysiologi, greitt frá, hvussu vit á ymiskan hátt kunnu vinna á lívstýlssjúkum á ein stuttligan hátt. Og Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, greiddi eisini frá, hvussu føroyingar hava broytt rørslumynstur seinastu árini.

Eftir fimleikin greiddu Ilikka Vuori, professari, úr Finnlandi og Bengt Sevelius, heiðursforseti í ENGSO, úr Svøríki frá teirra sjónarmiðum um heilsufremjandi átøk.

Seinast á skránni vóru konkret heilsufremjandi átøk í Føroyum

FØROYAR Í RØRSLU

# Føroyar á rættari leið

**Taka vit boðskapin hjá Bengt Sevelius, fyrrverandi aðalskrivara í svenska ítróttarsambandinum, so eru Føroyar á rættari leið at fáa fólk at røra seg, tí sambært honum eru smáir vallir og lokal ítróttarfeløg vegurin fram**

RØRSLUÁR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

– Tað skal vera stuttligt at røra seg, tí annars gera vit tað ikki leingi, sigur Bengt Sevelius, sum hevur arbeitt við ítrótt bæði í Svøríki og í Evropa seinastu árini. Tí heldur hann, at Føroyar eru á rættari kós, tí tað er í lokalum ítróttarfeløgum, at tað er stuttligt at íðka.

Lokal ítróttarfeløg er mest vanlig í norðurvestur Evropa, og longri eystur tú kemur, meiri óvanlig verða tey. Sambært Bengt Sevelius er orsøkin, at eystanfyri var ítróttur nakað, ið staturin skipaði fyri, líka til múrurin fall, og tí hava londini ikki royndir av sjálvboðnum virksemi.

### Sport

Hóast lokalu ítróttarfeløgini hava nógvar møguleikar, so hevur Bengt Sevelius lært, at orðið, sport, kann oyðileggja heilt fitt, tá fólkaheilsa skal seljast. Hetta upplivdi hann serliga innan ES, tá fólk fingu stóra andstygd fyri orðinum, so skjótt sum tað varð nevnt.

– Eg fekk at vita, at sport er nakað fyri elituítróttarfólk, og at tað ikki var tað, sum var í áhuganum hjá felagsskapinum. So hugsaðu vit um at kalla tað rørslu, og tá vóru fólk beinanvegin við uppá tað, staðfestir Bengt Sevelius.

### Sjálvboðin

Sambært Bengt Sevelius er tað sera týdningarmikið, at sjálvboðin eru við, tá talan er um rørslu, sum er heilsufremjandi, tí tað er ein kostnaðarlítil og sera effektivur háttur at fáa nógv í gongd.

– Tey lokalu feløgini kunnu gera so øgiliga nógv. Øll mugu sjálvandi gera sítt, bæði land, kommunur og øll hini mugu gera sítt besta hvønn dag, um tað skal muna, men tað eru tey sjálvbodnu, sum kunnu fáa tingini at henda. Tað eru tey, sum eru úti hjá fólkinum, og eru tey ikki við, so kann tað gera tað sama, hvat ymisku ráðharrarnir siga, sigur fyrrverandi aðalskrivarin í svenska ítróttarsambandinum.

### Útbúgving

Men er eitt økið, har vit í Norðurlondum ikki klára okkum so væl, sum vit burdu, so er tað við at útbúgva tey sjálvbodnu.

– Vit mugu geva teimum ungu ábyrgd, lova kvinnunum framat og lata tey gomlu koma innaftur í feløgini, tí tey duga eisini nógv, sigur Bengt Sevelius. Hann leggur afturat, at ein annar vansi kann vera, at vit alt ov tíðliga spesialisera okkara børn í eini ávísari ítrótt.

– Børnini mugu sleppa at royna ymiskar ítróttir, so tey fáa onkur góð upplivilsir av tí. Hóast fótbóltur og íshokey eru størstu ítróttagreinirnar í Svøríki, so merkir tað ikki, at øll børn skulu íðka júst hesar ítróttargreinar, staðfestir hann, og greiðir víðari frá, at vit hava heilt nógvar møguleikar at fáa menn og kvinnur at íðka saman.

– Flogbóltur er ein ítróttargrein, sum øll verulig kunnu íðka. Kvinnur og menn kunnu uttan trupulleikar íðka saman, sigur Bengt Sevelius.



*Bengt Sevelius, heiðursforseti í ENGSO greiðir frá, hvussu tann einstaki kann gera mun*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Stutt at fara

– Amerikanskar kanningar vísa nakað, ið veruliga kløkkaði meg. Tað vísir seg, at tað ikki eru eldsálir sum fáa fólk at íðka. Tað er heldur ein spurningur, hvussu langt tað er at fara til ymisku fasilitetirnar, greiðir hann frá, og leggur afturat, at hetta veruliga broytti hansara hátt at síggja uppá fólkaheilsu.

Somuleiðis greiðir hann frá, at lokal ítróttarfeløg



*Serliga ítróttarfólk, men eisini nógv onnur vóru í Norðurlandahúsinum í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*